# Útboð av Frontend skipan

økisnavn.fo

Útboð av Frontend skipan....1
Inngangur....3
Tíðarætlan og íverksetan....4
Krøv til tilboðið....4
Lýsing av núverðandi skipan....4
Nýggja skipanin....5
Meting av tilboði....5
Tíðarfreist....5
Orðalisti....6

# Inngangur

Forritan av skrásetingar skipan til økisnavn.fo verður nú boðin út í almennum útboði.

Veitarar fáa freist til 10. november 2023 at lata tilboð til FO-ráðið.

Fyri hesa freist er ein kunningar- og spurnarfundur, sum veitarar, við áhuga fyri at geva tilboð, kunnu umbiðja. Endamálið er at tryggja eina felags fatan av uppgávuni millum veitarar og Økisnavn, í mun til útbjóðingartilfarið.

Tá ið FO-ráðið hevur viðgjørt innlatnu tilboðini, verður samskift við útvaldar tilboðsveitarar, fyri at tryggja væntanarsamsvar millum innlatnu tilboðini og tilætlaðu loysnina. Við støði í hesum fáa veitararnir høvi at leggja tilboðið fram við møguligum broytingum. Eitt høvuðsendamál við hesum er at tryggja, at FO-ráðið fær eitt so gott sammetingargrundarlag av innlatnu tilboðnum, sum til ber.

Miðað verður eftir, at sáttmáli um veiting verður undirskrivaður í seinasta lagi 1. desember 2023.

Spurningar viðvíkjandi útbjóðingartilfarinum kunnu stílast til Guðrun Poulsen, stjóra í Økisnavn, á gudrun@økisnavn.fo

Útbjóðingartilgongdin fylgir hesi ætlan:

økisnavn.fo



## Tíðarætlan og íverksetan

Tíðarætlanin fyri útboðið er skipað, við tí fyri eyga, at tíð skal vera til at spyrja seg fyri og tryggja sær, at báðir partar hava somu fatan av uppgávuni.

Eftir spurnarumførini, og at freistin at lata inn er farin, viðger FO-ráðið tilboðini, og staðfestir at krøvini eru gingin á møti. Krøvini eru at rokna sum minsta mark.

## Krøv til tilboðið

Tilboðið skal vera á føroyskum. Tilboðið skal lúka øll tøknilig krøv, sum verða sett í útbjóðingartilfarinum, og sum verða mett viðkomandi í arbeiðinum við útboðnum. Her undir skal tilboðið vera grundað á upplýsingar, sum koma fram í samskiftinum millum FO-ráðið og áhugaðu veitararnar.

Um FO-ráðið metir tað vera viðkomandi í tilgongdini at seta onnur krøv enn tey, sum eru lýst í útbjóðingartilfarinum, verða allir áhugaðir veitarar kunnaðir um hetta skrivliga. Um so er, at tilboðið fevnir um veitingar, ið fara upp um minstu krøvini, sum eru sett í útbjóðingartilfarinum, skal hetta útgreinast.

## Lýsing av núverðandi skipan

FO-ráðið er at skilja sum høvuðs registry av .fo landaøkinum ( .fo ccTLD).

CentralNic er veitari av skipanini CSRSP, sum verður nýtt til umsitingina av .fo landaøkinum. Hendan skipanin tekur sær av øllum viðvíkjandi umsiting av sjálvum .fo landaøkinum, og er hendan skipan ikki partur av útboðnum.

Heimasíðan økisnavn.fo er at skilja sum ein registrar av .fo økisnøvnum, ið serliga vendir sær til føroyskar keyparar av .fo økisnøvnum. Tað finnast eisini aðrir registrarar av .fo økisnøvnum, millum annað one.com og godaddy.com.

Heimasíðan økisnavn.fo hevur eina frontend skipan, har tað er møguligt at leita eftir økisnøvnum, at skráseta, umframt at umsita økisnøvn, ið eru skrásett ígjøgnum økisnavn.fo. Innritan er í dag einans við skrásettum brúkaranavni og loyniorði.

Á kunningarfundi num verður núverðandi frontend skipan gjøgnumgingin, videofíla við gjøgnumgongdini verður send til áhugaði.

Frontendskipanin hevur eisini eitt umsitaramarkamót, ið umsitingin hjá Økisnavn hevur atgongd til.

Umsitingarmarkamótið er væl útbygt. Til ber at síggja ymiskar rapportir, og at umsita sambands- og kunda upplýsingar umframt brúkarar av skipanini.

Verandi umsitingarmarkamót verður gjøgnumgingið á kunningarfundinum, og ein videofíla við gjøgnumgongdini verður send til áhugaði.

Til umsiting av øksinavnaupplýsingum og skrásetingum verður gjørt brúk av EPP gjøgnum ambætarar hjá CentralNic.

Harumframt stýrir frontend skipanin eini lívsringrás hjá einum økisnavni. Tað vil millum annað siga, at ein teldupostur verður sendur til skrásetara, tá ið eitt økisnavn er skrásett, um broytinginar eru gjørdar, um skrásetari hevur valt sjálvirkandi gjald og um kortið er útgingið. Eisini verða sjálvvirkandi teldupostar sendir áðrenn økisnøvn ganga út.

Frontend skipanin er á føroyskum og enskum. Umsitingarskipanin er á enskum.

# Nýggja skipanin

Nýggja skipanin skal sum útgangstøðið hava sama virkisføri sum verandi skipan.
Umframt hetta eru nøkur nýggj krøv í mun til nýggju skipanina.

- Innritan við Samleikanum.
  í Frontend skipanini skal verða møguligt at rita inn við samleikanum umframt við brúkaranavni og loyniorði.

- Nýggjur gjalds gateway og betri umsiting av gjaldskipan, millum annað skal verða gjørligt at nýta ymisk kort til ymisk økisnøvn.

- Sambandsupplýsingar skulu váttast í Samleikanum/fólkayvirlitinum.

- Kjattfunka til kundar umframt møguleika fyri kjattrobotti til ofta spurdar spurningar.

- Umsitingarmarkamótið skal verða á føroyskum.

Ein fullfíggjaður listi av kravdum funktionaliteti er tilskilaður í viðfesta skjalinum “kravfestingar listi”.

# Meting av tilboði

Metingin av tilboðunum verður gjørd av FO-ráðnum saman við skikkaðum ráðgevum. Fyrsta meting er, um tilboðini lúka krøvini í útboðnum.

Um tilboðini ikki lúka krøvini, verða tey ikki tikin við í endaligu metingina. FO-ráðið metir, at útboðið og spurnarumførini eru nóg greið til, at tilboðsgevarar eiga at kunna lata inn nøktandi tilboð. Men um eitt tilboð ikki verður tikið við í endaligu metingina, fær tilboðsveitarin frágreiðing um avgerðina.

Tá ið staðfest er, hvørji tilboð lúka krøvini, og tí verða tikin við í endaligu metingina, verður hugt at prísi og tænastu, sum eru javnt býtt – 50% og 50%. Hetta merkir, at tað ikki neyðturviliga verður tikið av bíligasta tilboðnum.

FO-ráðið tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum tilboði og lýsa útboðið av nýggjum. Her undir um tað verður mett, at einki av tilboðunum er nøktandi.

# Tíðarfreist

Evsta freist at lata inn tilboð er 10. novembur 2023 kl. 16:00. Tilboðið skal sendast talgilt til gudrun@økisnavn.fo.

Tilboð kunnu einans sendast inn eftir freistina, um skrivlig fráboðan er komin til Økisnavn og Økisnavn hevur játtað. Økisnavn tilskilar sær rætt til ikki at leingja freistina. Um freistin verður longd, verður hetta kunnað til allar tilboðsgevarar, so at øll fáa somu longdu freist at lata inn tilboð.

# Orðalisti

Hesar orðingar og styttingar verða nýttar í útboðnum og fylgjiskjølum.

| Stytting | Lýsing |
|---|---|
| CMS | Content management system |
| CentralNIC | CentralNic er veitarin av bæði backend og frontend skipanum hjá Økisnavn |
| CSRSP | CentralNic Shared Registry Service Platform. Hetta er skipanin, ið FOráðið nýtir til at stýra og viðlíkahalda øllum skrásetingunum viðvíkjandi .fo landaøkinum. |
| ccTLD | country code Top Level Domain. |
| Samleikin | Samleikin er talgild innritingarskipan hjá Talgildu Føroyum. |
| EPP | Extensible Provisioning Protocol. Protokoll, ið verður nýtt til at stýra økisnavnaskrásetingum https://en.wikipedia.org/wiki/Extensible_Provisioning_Protocol |